# Vinnumálaráðið á liðmenningardegi í Suðuroynni

**Hósdagin var manning úr Vinnumálaráðnum í Suðuroynni og hevði ein øðrvísi dag á bæði sjógvi og landi, har samstarv og øðrvísi arbeiðsuppgávur vóru á skránni**

MENNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, og manning úr Vinnumálaráðnum, vitjaðu Suðuroynna hósdagin. Tað var tó ikki sum vanlig ferðafólk, at tey settu dám á bygdamyndirnar.

Tey vóru nevniliga á liðmenningardegi, eisini nevnt teambuilding. Hetta verður nýtt fyri at hefta arbeiðsbólkar tættari saman.

Hugskotið er, at við øðrvísi, ofta skemtiligum, uppgávum og upplivingum, har høgur sum lágur púra náttúrliga fær nýggjar leiklutir, verður liðið eitt tættari arbeiðslið, ið kennir hvønn annan betri og sum eisini hevur eina felags uppliving at hyggja aftur á, har fólk kanska vístu óvæntað hegni og ókendar síður.

Dagurin í Suðuroynni fevði m.a. við sær koyring við smærri bilum í Vági, rógving við gomlu grindabátunum, matstøðgur umborð á sluppini Johonnu og sigling við skjóttgangandi bátinum Scorpion. Alt hetta var tó ein arbeiðsgongd fyri at fáa fatur á døgurðabitanum, ið var ein grýta, ið var í mastrini á Johonnu.

Seinni var t.d. farið í skúlan í Sumba, at eitt serligt sansarúm er gjørt, har fólk mugu nýta sansirnar.

Tá Sosialurin kom framvið hósdagin á miðdegi, var manningin á veg í grindabátarnar, og Bjørt Samuelsen, og hini, vóru sostat mitt í tilgongdini at skaffa sær døgurðabitan, men tey vóru í góðum lag og til dystin fús, og Bjørt fegnaðist um tiltakið og um møguleikan at koma eitt sindur út, har hon vanliga ikki ferðast.

# Merkisdagar í Norðurlandahúsinum

**Í morgin heldur danski rithøvundurin Jens Smærup Sørensen fyrilestur Í Norðurlandahúsinum um ritverk sítt við serligum atliti til seinastu skaldsøgu sína Mærkedage**

FYRILESTUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Í morgin klokkan 15 verður høvi at hoyra virðislønta høvundan Jens Smærup Sørensen halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Polfoto*

Bókin *Mærkedage* er ein ættarliðsskaldsøga um tvær týðandi familjur í Staun, heimbygdini hjá høvundanum. Søgan verður søgd við støði í eini konfirmatión í 1934, einum silvurbrúdleypi í 1967 og einum 60 ára føðingardegi í 2003.

Við støði í hesum trimum merkisdøgunum, snarar skaldsøgan kring skiftið frá gamla bóndasamfelagnum til nútíðar vælferðarsamfelagið.

## Virðisløntur høvundur

*Mærkedage* er higartil heiðrað við: De Gyldne Laurbær 2007, Weekendavisens litteraturpris 2008, DR Romanprisen 2007. Hartil hevur skaldsøgan verið innstillað til Norðurlendsku bókmentavirðislønina 2007 og Danske Banks Litteraturpris 2007.

Jens Smærup Sørensen er føddur í Staun í 1946. Hann gav út sína fyrstu skaldsøgu *At ende som eneboer* í 1972 og fekk Det Danske Akademis ´Lille Pris´, Otto Gelsted-Prisen fyri hana. Eftir útgávuna av skaldssøguni Katastrofe fekk hann Kritikerprisen og fyri alt ritverkið sítt Det Danske Akademis Store Pris í 1990.

Hartil hevur hann eisini skrivað fleiri skaldsøgur m.a. *Byggeri* (1975), *Skovennu* (1978), *Mit danske kød* (1981), *En musikers bestemmelse* (1982), *Kulturlandsbyen* (1996), *Astrid* (2004) og *Mærkedage* (2007).

Fyrilesturin í Norðurlandahúsinum verður í morgin klokkan 15. Tiltakið er ókeypis.


# Fíggjarleiðari

Føroya størsta grafiska virki søkir eftir fíggjarleiðara. Føroyaprent er eitt virki í menning og tað er av alstórum týdningi, at góð fíggjarleiðsla er ein partur av hesari menning. Fíggjarleiðarin virkar við tilvísing til stjóran og í okkara leiðslubólki.

**Vit hugsa okkum, at tú**
- hevur eina viðkomandi útbúgving
- royndir innan fíggjar- og roknskaparøkið
- evni at raðfesta og leggja arbeiðið til rættis
- góð samstarvsevni
- hevur áræði, ert álítandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

**Ábyrgdarøki**
- At gera fíggjarætlanir og roknskap, herundir fíggjarstýring og uppfylging.
- At menna mannagongdir á fíggjarøkinum
- At hava ábyrgd av bókhaldinum
- At hava eftirlit við rakstrinum
- At fáa til vega uppgerðir og hagtøl
- At hava ábyrgd av vanligari umsiting

**Arbeiðsviðurskifti**
- Løn og setanartreytir eftir avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

Umsóknarfreist
15. september 2008.

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
hestoy@foroyaprent.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo